# Reglur um rusk og burturkast frá húskjum í IRF-limakommunum (framhald)

Hesar reglur eru samtyktar á aðalfundi felagsins 3. mai 2007

## Fylgiskjal 2. Góðkend ruskstativ

Stativ við galvaniseraðum neti, t.d.



Stativ við timburgyrðing til ein posa, t.d.



Stativ við timburgyrðing til tveir posar, t.d.

## Fylgiskjal 3. Innsavning av húsarhaldsruski

1. Posastativið stendur úti á sjónligum stað, og sum høvuðsregla á stytstu leið millum atkomuveg og húsini, tó í mesta lagi 20 metrar frá atkomuvegi. Bert ein støða skal vera á hvørjari ogn.

2. Støðan skal vera soleiðis, at tað er møguligt at koma heilt fram at stativinum við t.d. sekkjavogni, at stativið stendur á sløttum, soleiðis at posin kann takast uttan trupulleikar, og at posin kann takast og flytast uttan vanda fyri vanlukku ella heilsuskaða.

3. Rusk má ikki koyrast leyst í ruskposan, men skal vera innballað ella í posa. Blæur, bind o.l. skulu altíð vera í afturlatnum plastposa, áðrenn tey verða latin í ruskposan.

4. Posin er at rokna sum fullur, tá ið 20 cm eru eftir upp til kantin. Serligur dentur verður lagdur á, at posin ikki er skræddur, og at posin ikki vigar meira enn 20 kg.

5. Gonguleiðin millum ruskstativi og ruskbilín skal vera soleiðis háttað, at flutningur av ruskposa kann fara fram uttan vanda. Gonguleiðin skal vera sløtt og føst, uttan at vera hál, ljós, rein og ruddilig, og ruddað fyri kava og ís.

6. Portur, lúkur e.l. skulu kunna standa í opnari støðu, og vera nóg breið og høg til at flutningurin kann fara fram uttan vanda.

7. Ruskinnsavnarin letur portur, lúkur o.t. aftur, tá farið verður av ognini.

8. Dettur rusk niður, tá posin verður tikin, tekur ruskinnsavnarin hetta upp og beinir tað burtur, treytað av at krøvini í pkt. 4 eru fylgd.

9. Verður ruskposin ikki tikin, skal ruskinnsavnarin boða frá hesum við einum fráboðanarlepa, sum hann leggur í postkassan ella á annað hóskandi stað.

## Fylgiskjal 4. Krøv til bingjupláss

**1. Teknisk krøv til bingjupláss**

Hesi minstukrøv verða sett til bingjupláss viðvíkjandi støðd, styrki, trygd og reinføri.

- fast og tætt undirlag - skal tola 10 tons aksiltrýst
- betonggarð - uml. 0,5 m høgur
- hegn - uml. 2 m høgt
- portur - meira enn 6 m breitt
- festir til bingjur, sum standa á plássinum
- ljós - so tað sæst at ganga og at lesa møguligar vegleiðingar á bingjum o. ø.
- vatn – nóg mikið til at spula pláss og bilar
- frárensl - helst við brunni til feitt og botnfall
- atkomu - liggur bingjuplássið við ein høvuðsveg, er neyðugt at hava umleið 9 metrar millum bingjur og portur. Kunnu ruskbilarnir brúka atkomuøkið at arbeiða á, kann plássið vera grynri. Bilarnir eru upp til 10 metrar langir.

Mælt verður til, at leggja størri broytingar ella nýgerð fyri IRF til viðmerkingar, áðrenn broytingarnar verða framdar.

**2. Skipan av bingjuplássum**

2.1 Vanlig bingjupláss
Minstu krøv til skipan av móttøku av ruski og burturkasti eru hesi:

- Plássið er bert opið ávísar tíðir
- Plássið er mannað, tá opið er
- Plássið tekur bert ímóti burturkasti frá húskjum
- Tað skal í minsta lagi vera møguligt at skilja burturkast í bingjur soleiðis:
    - tað, sum skal brennast
    - pappír & papp
    - jarn & metal

Annað burturkast, undantikið serliga dálkandi burturkast og trýstfløskur, kann setast á plássið.

2.2 Vælriggað bingjupláss
Umframt tey í 2.1 nevndu krøv, skal á hesum plássum harafturat verða møguligt at skilja burturkast soleiðis:

- elektronikk
- kuldaskáp og fyrstiboksir
- serliga dálkandi burturkast
- trýstfløskur
- spillolju
- burturkast, sum skal tyrvast

Bingjupláss taka ikki ímóti fýrverki ella øðrum spreingitilfari

## Fylgiskjal 5. Avrokning fyri burturkast frá kommunalum ruskmóttøkustøðum

1. Ársfjórðingsnøgd: Rusk og burturkast frá ruskmóttøku, svarandi til 0,34 $m^3$ um ársfjórðingin fyri hvønn íbúgva við ársbyrjan.

2. Hvønn ársfjórðing verður gjørt upp, hvussu nógvir rúmmetrar av burturkasti eru heintaðir av ruskmóttøkuni í hvørjari kommunu í hesum flokkum:
    - burturkast, sum skal brennast
    - jarn og metal íroknað kulda- og frystiútbúna
    - pappír og papp
    - elektronisk tól
    - burturkast til tyrving.

3. Nøgdin svarandi til ársfjórðingsnøgd er upp í limagjaldinum. Er nýtslan í einum ársfjórðingi minni enn ársfjórðingsnøgd, fellur munurin millum nýtslu og ársfjórðingsnøgd burtur.

4. Á móttøkustøðum, sum eru skipað í tráð við Fylgiskjal 4, pkt 2.2, verður avroknað soleiðis:

   Lagt verður saman upp til ársfjórðingsnøgdina í hesari raðfylgju:
   \+ elektronisk burturkast
   \+ burturkast, sum skal tyrvast
   \+ burturkast, sum skal brennast
   \+ jarn og metal
   \+ pappír og papp

   Tað, sum fer upp um kvotuna, verður avroknað sambært galdandi IRF takstskipan. Harafturat kann verða álagt eykagjald fyri fráskiljing sambært galdandi IRF takstskipan.

5. Á móttøkustøðum sum eru skipað í tráð við Fylgiskjal 4, pkt 2.1, verður avroknað soleiðis:

   Lagt verður saman upp til kvotuna í hesari raðfylgju:
   \+ elektronisk burturkast
   \+ burturkast, sum skal tyrvast
   \+ burturkast, sum skal brennast
   \+ jarn og metal

   Tað, sum fer upp um kvotuna, verður avroknað sambært galdandi IRF takstskipan. Harafturat kann verða álagt eykagjald fyri fráskiljing sambært galdandi IRF takstskipan.

IRF